ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Broyting til uppruna tekstin í viðhefta skjalinum**

Nýggjur tekstur at seta inn eftir triðja setning undir **Endamál**

“Nýggi grafiski samleikin skal byggja víðari á verandi samleika, men talan er um at endurnýggja verandi úttrykk.”

*

Í seinasta setningi undir **Endamál**, nýggj orðing í staðin fyri “Tíðin er komin til at dagføra samleikan.”

verður orðað soleiðis:

“Tíðin er komin til at dagføra úttrykkið í verandi samleika”.

*

Nýtt orð inn í fyrsta setning í **Hvat verður biðið um:** **“**Dagført”

Verður nú orðað soleiðis:

“Dagført grafiskt úttrykk – Taluboblan kann varðveitast”

*

Nýggjur tekstur til næstseinasta brotið: **Meta um tilboðini**.

Teksturin verður orðaður soleiðis:

**“Meta um tilboðini:** Biðið verður ikki um kreativt arbeiði. Ístaðin verður biðið um tilvísingar til líknandi uppgávur, eins og tilboðsgevarin verður biðin um at koma við hugskotum um, hvussu ljós kann varpast á Sig frá!

Mett verður um tilboðini út frá einum heildarsjónarmiði. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50 % royndir og góðska. Mett verður um orginalitet, haldbari og brúkbari í tilvísingunum, sum veitarin fyrr hevur loyst og møguleikarnar at levera skjótt.

50 % kostnaður.”

*Í næstu síðunum er teksturin settur inn í uppruna skjalið.*

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

**Nýggjur grafiskur samleiki til SIG FRÁ!**

**Endamál:** Almannamálaráðið hevur ábyrgdina av Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum, sum byrjaði í 2012 og sum fekk heitið: Sig frá!

Seinni kom Heildarverkætlan um kynsligan ágang og er hon eitt framhald av hesi fyrr.

Gjøgnumgangandi fyri báðar verkætlanirnar, hevur verið brúktur ein grafiskur leistur, serliga eyðkendur við talubobluni og "Sig frá!"

Nýggi grafiski samleikin skal byggja víðari á verandi samleika, men talan er um at endurnýggja verandi úttrykk.

Tilgongdin fylgir hesum fýra høvuðsøkjum:

- At upplýsa og fyribyrgja harðskap
- Stuðul til harðskaparrakt
- Átøk, ið venda sær til yrkisbólkar
- Átøk, ið venda sær til teirra, ið fremja harðskap

Talan eru um fleiri ítøkilig átøk, sum millum annað snúgva seg um upplýsing, undirvísing, viðgerðartilboð. Í hesum arbeiði er grafiski samleikin berandi. Talan hevur verið um millum annað:

- Búmerki
- Faldarar
- Lýsingar
  - Blað
  - Ljóð/útvarp
  - Film/sjónvarp/heimasíðu
  - Sosialar miðlar
  - Bannarar
- Grafisk uppseting annars m.a. til
  - Signatur í telduposti
  - Rolls-up
  - heimasíðuna
  - ymisk lýsinginarlutir

Tíðin er komin til at dagføra úttrykkið í verandi samleika.

**Málbólkur:** Øll – men hann skal kunna venda sær til bæði børn, ung og vaksin.

**Hvat verður biðið um:** Dagført grafiskt úttrykk – Taluboblan kann varðveitast

Eitt breitt úrval av lýsingum, sum kunnu brúkast til avísir, magasin, bannarar í ymiskum støddum og til ymisk høvir og við ymiskum boðskapum t.d. harðskapur á jólum, harðskapur á ólavusøku.

Til faldarar, sjónvarpslýsingar til t.d. Gevið Gætur!, innsavningartiltøk, til sosialar miðlar, ljóð-fílur.

Grafiskt úttrykk til heimasíðuna, www.amr.fo - myndir í ymiskum støddum – eisini til snarknøttar (t.d. viðgerðartilboðini)

Signatur til teldupost.

**Tilgongdin frameftir:** Almannamálaráðið bjóðar við hesum uppgávuna at gera nýggjan grafiskan samleika SIG FRÁ! í útboð við freist, sí niðanfyri. Tá ein veitari er funnin, verður grafiski samleikin og tilfar endaliga ment í samstarvi millum Almannamálaráðið og veitaran. Tíðarætlanin fyri útboðið er soleiðis:

**Vika 44** Útboðið tøkt á útboðsportalinum 5. november 2021

**Vika 45 og 46**. Veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 19. november kl. 12

**Vika 47**. Tann 26. november 2021 kl. 12 er freist at lata inn tilboð

**Vika 48**. Viðgerð av tilboðunum

**Vika 48.** Almannamálaráðið tekur avgerð og fráboðan send veitarunum tann 3. desember 2021

**Meta um tilboðini:** Biðið verður ikki um kreativt arbeiði. Ístaðin verður biðið um tilvísingar til líknandi uppgávur, eins og tilboðsgevarin verður biðin um at koma við hugskotum um, hvussu ljós kann varpast á Sig frá!

Mett verður um tilboðini út frá einum heildarsjónarmiði. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50 % royndir og góðska. Mett verður um orginalitet, haldbari og brúkbari í tilvísingunum, sum veitarin fyrr hevur loyst og møguleikarnar at levera skjótt.

50 % kostnaður.

**Almannamálaráðið tilskilar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði.**